# Mentanarvegir møtast

Fríggjakvøldið fáa føroyingar møguleika at síggja eitt fjølbroytt mentanartiltak í Norðurlandahúsinum.

Fríggjakvøldið verður møguleiki at síggja eitt forvitnisligt mentanartiltak í Norðurlandahúsinum. Talan er um eitt multietniskt tiltak, sum hevur fingið heitið »Crossroads«.

– Okkara framførsla rúmar mangt og hvat. Vit hava savna teir ymisku mentanarberararnir í Norðanlondum, og samansjóað tað til eina heildarupplivving. Talan er bæði um tónleik, dans og málaríir, og tí hava vit givið tiltakinum heitið Crossroads, tí ymiskar listarliga greinar møtast, sigur Indra Lorentsen, sum stendur fyri tiltakinum.

Hugskotið aftanfyri Crossroads er at fáa ungdómin tilvitaðan um gomlu norðurlendsku siðvenjurnar, og vísa á, at tað ber væl til at blanda gamla mentan og nútímans tónleik.

– Eg kann lova, at áhoyrararnir fáa bæði eina visuella og tónlistarliga ferð fríggjakvøldið, sigur Indra Lorentsen.





## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og ÷5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig. Um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Nakað lýggjari.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingi og vátaslettings- ella kavaælingur. Hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri og útnyrðingi, eitt skifti minni vindur. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið mest undir frostmarkinum.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷6 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 9 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | – |
| Moskva | – |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 19 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 7 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | – |
| New York | 5 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | – |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 972 hPa. í landnyrðing úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og dýpist. Kuldabrúgvin haðani til havið sunnan fyri Føroyar fer í landsynning og hevur kalda luft við sær.




Lágtrýstið við Lofoten fer í landnyrðing og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/11 kl. 06[00]–11/11. 06[00]. Hitin í gjár: 7,6°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 11,6 mm – mált frá 10/11 kl. 06[00]–11/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 49,5 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

GEVIÐ BLÓÐ

Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 304522
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

12. november: Tendring
14. november: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 12. nov | 05.44 | 18.08 | 04.44 | 17.08 | 04.59 | 17.23 | 07.44 | 20.08 | 08.44 | 21.08 | 03.59 | 16.23 | 02.59 | 15.23 | 05.59 | 18.23 | 06.59 | 19.23 | 05.29 | 17.53 | 06.44 | 19.08 |
| 13. nov | 06.34 | 19.00 | 05.34 | 18.00 | 05.49 | 18.15 | 08.34 | 21.00 | 09.34 | 22.00 | 04.49 | 17.15 | 03.49 | 16.15 | 06.49 | 19.15 | 07.49 | 20.15 | 06.19 | 18.45 | 07.34 | 20.00 |
| 14. nov | 07.28 | 19.57 | 06.28 | 18.57 | 06.43 | 19.12 | 09.28 | 21.57 | 10.28 | 22.57 | 05.43 | 18.12 | 04.43 | 17.12 | 07.43 | 20.12 | 08.43 | 21.12 | 07.13 | 19.42 | 08.28 | 20.57 |
| 15. nov | 08.28 | 20.59 | 07.28 | 19.59 | 07.43 | 20.14 | 10.28 | 22.59 | 11.28 | 23.59 | 06.43 | 19.14 | 05.43 | 18.14 | 08.43 | 21.14 | 09.43 | 22.14 | 08.13 | 20.44 | 09.28 | 21.59 |

5 707265 100050 >